TILTØK

Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Leygarkvøldið Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, kl. 12 Tilbiðjanarmøti.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini. www.livdin.fo

Meinigheitin í Hoyvík uppi á Brekku 3
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ Jóhan Petur Johannesen, evnið: Hvat er ein lærusveinur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Onki møti vegna vígslu av Kelduni.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

Missiónshúsið við Landavegin
Í kvøld kl. 20 Møti.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti.

Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum
Hósdagin kl. 20 Bibliutími v/ Hera Tróndheim, Opb. 8.

Frelsunarherurin, Tórsgøta 19
Hósdagin kl. 20 byrjar Heimaforbundið aftur. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Ebenezer
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 21 Teen-Night. Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Fríggjadagin einki ungdómsmøti vegna stevnuí Kelduni.
Leygardagin eingin landsbøn vegna stevnu í Kelduni.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC v/ Fríðtór Debes, evnið er: Trúgv (yvirhøvur) 2. partur. Einki møti vegna stevnu í Kelduni.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samroðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar mán-frí frá kl. 8-16.
www.filadelfia.fo

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis Barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini møti har David Peckham úr Onglandi talar. www.hebron.fo

Katólska Kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hóskvøldið 2. sept. kl. 20 verður fyrsta Taizé-kvøldið aftur í Kerit. Øll eru vælkomin.
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Tuomo Vimpari, prestur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin 5. sept. kl. 14. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Meinigheitshúsið
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21.30 Juniorhugni, frá 5. flokki.
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta fyri kvinnur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti – innsetan av Reimund Langgaard sum ungdómstrúboðara, v/ Bergur Debes Joensen, kór luttaka.

Saron, Vestmanna
Evangel. møti verður Sunnudagin kl. 18 við dópi. Jóhan Hendrik Hansen talar. Nátturði verður aftaná. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

Keldan, Skálafirði
Vælkomin til festvikuskifti:
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti.
Leygarmorgunin kl. 10.30 Morgunmøti, kl. 17 Møti, kl. 21 AWAKE, ungdómstiltak.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti, kl. 15 Familjumøti, kl. 18 Festmøti.
Luttakandi talarar: David Hansen, Enevald Flåten, Ejvind Frøen og Pauli Høj. Sanglluttøka: Lisa og Kristina, Trio úr Kollafirði, Dupult Kvartet úr Kelduni, Eyðun og Terje, Lovsangskórið úr Kelduni. www.keldan.fo

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 Møti við Gimma Olsen. Innsamling til húsið. Aftaná møti verður drekka. Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Jónbjørn Nýggjagarð.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygardagin kl. 20 Hugnaløta v/ burturluting.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Eyðun Christiansen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Hirtshals
Danskt møti verður í missiónshúsinum sunnudagin 5. sept. kl. 19.30 v/ Hera Elttør, trúboðara.
Randers
Mánadagin 6. sept. kl. 19.30 verður føroyskt møti hjá Søley og Atla Dáva Nattestad, Kristrupvej 38b, 1. sal, Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari talar.
Árhus
Týsdagin 7. sept. kl. 19 verður føroyskt møti hjá Malene og Símin Jacobsen, Moltkersvej 10, 1 th. Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari talar. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møtir.

90 ÁR

Fríggjadagin 3. september verður Anna K. Madsen, Kvívík, búsitandi á eldrasambýlinum í Kollafirði, 90 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

75 ÁR

Leygardagin 4. september verður Jastrid Foldbo, Leirvík, 75 ár. Føðingardagurin verður hildin í Sleipnisgøtu 11 í Tórshavn frá kl. 19.00 sama dag.

70 ÁR

Leygardagin 4. september fyllir Amaliel Knudsen 70 ár. Dagurin verður hildin á Feriehjemmet Aggershøj, Møllevejen 50, 5960 Marstal.

BRÚDLEYP

Leygardagin 9. oktober kl. 16.00 giftast í Kvívíkar kirkju Andrea á Ripuni, Klaksvík og Tórarinn Niclasen, Hvalba. Vælkomst verður í Glæmuni kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 10. september á tlf. 421505.

GULLBRÚDLEYP

19. september hava Jórun og Petur Meinhard Jacobsen, Skipanes gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 14.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið kunnu ringja nr. 441288, 448968 ella 449498 innan 11. september.

Havnar Arbeiðskvinnufelag:

Hetta er tað bera tvætl

– Tey fimm arbeiðarafeløgini í landinum draga ikki somu línu í málinum um trýpartasamráðingar, tí Havnar Arbeiðskvinnufelag vil als ikki vera við

TRÝPARTASAMRÁÐINGAR
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin

Tað er nú alt, sum bendir á, at royndirnar at fáa avtalu ímillum Arbeiðsgevarafelagið, fakfeløg og landsstýrið um lønarsteðg, er skotnar langt undir kav.

Fyrst boðaði landsstýrismaðurin í figgjarmálum frá, at tað er ein treyt, atøll fakfeløgini standa saman um ætlanina.

Men Starvsmannafelgið hevur longu boðað frá, at tað verður undir ongum umstøðum við.

Og nú er eisini greitt, at tað er ikki so frægt sum at arbeiðarafeløgini eru samd um ætlanina.

Eitt av teimum stóru arbeiðarafeløgunum, Havnar Arbeiðskvinnufelag, vendir eisini tummulin niðureftir.

– Vit fara ikki at gera nakra avtalu um lønarsteðg afturfyri at skattir og avgjøld skulu lækka, sigur Vígdis Johannesen, forkvinna í felagnum.

Tað var Havnar Arbeiðsmannafelag, sum skeyt upp at arbeiðsgevarar og fakfeløg fóru undir samráðingar við landsstýrið um at halda kostnaðarstøðinum í samfelagnum niðri fyri at bøta um kappingarførið.

Tað skuldi gerast við, at fakfeløgini bjóðaðu sær til at halda aftur í lønarkrøvum, men afturfyri skuldi landsstýrið binda seg til at lækka skattir og avgjøld.

– Tað er beinleiðis tvætl at tosa um lønarsteðg aftur fyri at fáa skattalætta, sigur vígdis Johannesen. Arbeiðarafeløgini eru sostatt ósamd um ætlanina og Havnar Arbeiðskvinnufelag verður undir ongum umstøðum við

Rætt og slætt tvætl

Forkvinnan í Havnar Arbeiðskvinnufelag kallar tað rætt og slætt tvætl at tosa um trýpartasamráðingar.

Nevndin í felagnum er sannført um, at skattapolitikkur og lønarpolitikkur skulu ikki tvinnast saman.

– Halda vit, at tað rætta løtan er at halda aftur í lønarkrøvum, gera vit tað, uttan at hugsa um skattapolitikk.

Annars heldur Vígdis Johannesen, at hetta er ikki rætta løtan at tosa um skattalætta.

– Tað verður sagt, at landið er í kreppu og at peningur manglar í. Tað er ikki rætta løtan at tosa um skattalætta, tí so kemur enn meiri at mangla í. Og tað verða í hvussu so ikki tey lágløntu, sum fara at fáa nakað burturúr tí.

Hon skilir heldur ikki uppáhaldið um, at bara lønarlagið lækkar, fer tað at skapa eina rúgvu av arbeiðsplássum.

– Hvør kann vísa á tað? Fyriliggur nøkur ætlan? Hvar vera hesi arbeiðsplássini og hvussu nógv vera tey?. Tað er ongin førir fyri at siga, sigur Vígdis Johannesen.

– Annars hava vit als onga ávirkan á, hvat vørur og tænastur kosta og tað er eisini ein orsøk til, at vit als ikki taka undir við tosinum um lønarafturhald.

Í gjár skuldi fundur vera ímillum arbeiðsgevarafelagið og arbeiðarafeløgini um trýpartasamráðingar.

Havnar Arbeiðskvinnufelag ætladi sær við á fund, men felagið fór ikki á fund fyri at taka lut í einum kjaki um trýpartasamráðingar.

– Vit fóru einans á fund fyri at gera okkara meining púra greiða. Og hon er, at vit vera ikki við í nøkrum trýpartasamráðingum, har lønarlag og skattapolitikkur verða tvinnað saman, sigur hon

– Tað undrar eisini hana, at seinast samráðingar vóru, var alt arbeiðsfólkið í einum drúgvum verkfalli fyri at fáa nøkur heilt fá oyru afturat. Men blekkið á nýggja sáttmálanum var ikki meiri enn tornað, so verður boðað frá, at nú er rætta løtan komin at tosa um lønarsteðg. Tað er meiningsleyst, sigur forkvinnan í Havnar Arbeiðskvinnufelag.

– Tað er rætt og slætt tvætl at tosa um lønarsteðg afturfyri at skattir og avgjøld skulu lækka og eg haldi, at tað er meiri enn merkiligt, at slíkt er til viðgerð í eini javnaðarstjórn, sigur Vigdis Johannesen, forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Sí eisini grein á síðu 7.

Tosa um kommunusamanlegging

Á bygdarráðsfundi í Sørvági týskvøldið var eitt av málunum umsókn um at leggja Sørvágs- og Mykines kommunur saman

KOMMUNUTÍÐINDI
Edvard Joensen

Sørvági:
Áhugi er fyri enn fleiri kommunusamanleggingum í Vága Sýslu. Mykines Kommuna ynskir at leggja saman við Sørvágs Kommunu, og viðgerð av teirri umsóknini var eitt av málunum á bygdarráðsfundi, sum var í Sørvági týskvøldið. Bygdarráðið gjørdi á fundinum av at arbeiða víðari við hesum málinum.

Eivin Jacobsen borgarstjói í Sørvági, sigur, at fundur millum kommunurnar er avtalaður til at verða tann 13. september, og miðað verður eftir at hava tikið eina avgerð áðrenn mikkjalsmessu, sigur hann.

Nú hevur Sørvágs Kommuna nýliga verið í samráðingum um samanlegging. Ta ferðina við Biggjar Sóknar Kommunu, so tað átti at borið til at nýtt royndirnar frá teimum samráðingunum í hesum umfarinum, heldur borgarstjórin í Sørvági, sum hevur boðað frá, at hann ikki stillar upp aftur til kommunuvalið í november.

Á bygdarráðsfundi í Sørvági týskvøldið var eitt av málunum at leggja Mykines Kommunu saman við Sørvágs Kommunu

Mynd : Edvard Joensen

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo

Hósdagin 02.09. kl. 20⁰⁰

Hósdagin 02.09. kl. 22⁰⁰

Hósdagin 02.09. kl. 22⁰⁰

Hósdagin 02.09. kl. 19³⁰
– Seinasta sýning



Við danskari talu
Hósdagin 02.09. kl. 18⁰⁰
– Seinasta sýning

KOMANDI FILMAR

Frumsýning – Billettprísur: 55,- kr.
Við danskari talu
Fríggjadagin 03.09. kl. 15³⁰
Fríggjadagin 03.09. kl. 17³⁰
Fríggjadagin 03.09. kl. 19⁰⁰
Við enskari talu og donskum teksti
Fríggjadagin 03.09. kl. 17⁰⁰
Fríggjadagin 03.09. kl. 19³⁰
Fríggjadagin 03.09. kl. 21³⁰

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu